ELFELAGIÐ SEV
LANDAVEGUR 92
POSTBOX 319
110 TÓRSHAVN
FØROYAR

Argir hin 13. januar 2012
Málsnr.: 11/00408-7
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Eyð Eidesgaard

# Umhvørvisgóðkenning
# av
# vindmyllum hjá Elfelagnum SEV
# Í Neshaganum

## 1. Góðkenning og heimildir

Henda umhvørvisgóðkenning av vindmyllum hjá Elfelagnum SEV, matr. nr. 155a í Neshaga, er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, seinast broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, sum broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóggávu.

## 2. Umsóknin

Umhvørvisstovan fekk hin 10. juni 2011 umsókn um umhvørvisgóðkenning av vindmylluverkætlan frá Elfelagnum SEV. Vindmyllurnar skulu framleiða elorku, sum verður latin á elnetið hjá SEV. Saman við umsóknini er móttikin umhvørvisárinsmeting fyri verkætlanina.

## 3. Lýsing av virkseminum

Vindmyllurnar verða staðsettar á matr. nr. 155a á Eystnesi í Eysturoy. Sambært byggisamtyktini fyri økið, er talan um øki H, sum er lagt út til landbúnað, grótbrot og alistøðir. Í ásetingunum fyri økið er loyvt at gera slík teknisk virki og hús, ið eru neyðug til ravmagnsveitingar. Umhvørvisstovan metir, at vindmyllur kunnu koma undir hetta.

Tríggjar vindmyllur av slagnum Enercon E-44 við orkuni 900 kW, 44 metra veingjatvørmáti og 45 metra hædd, verða settar upp í Neshaga. Frá vindmyllunum verður lagdur elkaðal til íbindingarstað, sum verður við uttastu av verandi vindmyllunum. Við hvørja myllu verður eitt 20 x 30 m stórt arbeiðspláss gjørt. Vindmyllurnar fara at framleiða 10,6 GWh um árið.

Vegur til vindmyllurnar verður lagdur vestan fyri Nesvatn.

Vindmyllurnar eru góðkendar eftir altjóða góðkenningarklassa, sum m.a. tilskilar, at vindmyllan er gjørd til øki við høgari vindferð og turbulensi.

## 4. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Teir ampar, sum kunnu væntast at vera av vindmyllunum – umframt tað, at tær eru sjónligar í umhvørvinum - eru óljóð, skuggakast og endurskin.

Elfelagið SEV hevur gjørt eina umhvørvisárinsmeting fyri virksemið, sum millum annað viðger hesar ampar. Sambært umhvørvisárinsmetingini kann skuggakast koma fyri í Æðuvík, tá ið sólin stendur lágt í november, desember og januar. Sambært kanningum hjá SEV, kunnu sunnastu húsini í Æðuvík verða rakt av skuggakasti í mesta lagi 15 min hvønn dag í november, desember og januar - tó í mesta lagi 10 tímar um árið. Umhvørvisstovan hevur sett treyt um, at virksemið í minst møguligan mun elvir til ampa av endurskini og skuggakasti, og markvirði er ásett fyri, hvussu nógvar tímar skuggakast í mesta lagi kann vera um árið. Er skuggakast í meira enn 10 tímar, má myllan steðgast, tá líkindi eru fyri skuggakasti, so markvirði um í mesta lagi 10 tímar árliga, kann haldast.

Nakað av óljóði kemur frá vindmyllunum tá tær eru virknar, og økist óljóðið við vindferðini. Tó er tað so, at ljóð frá vindinum sjálvum økist enn meira og ofta hoyrist ein vindmylla best við 4 – 8 m/s vindmegi. Sambært útrokningunum, sum SEV hevur fingið frá vindmylluveitaranum Enercon, halda vindmyllurnar ásettu markvirði fyri óljóð – og tá er óljóð frá verandi vindmyllum eisini tikið við.

Markvirði verða sett fyri, hvussu nógv óljóð kann koma frá vindmyllunum við bústaðir og stovnar í og uttan fyri bústaðarøki við 6 m/s og 8 m/s. Sambært umhvørvisárinsmetingini eiga tey at kunna haldast, um nýggju vindmyllurnar verða staðsettar uttast á Eystnesi.

Umhvørvisstovan hevur viðgjørt og góðkent við ávísum treytum umhvørvisárinsmetingina hjá Elfelagnum SEV. Hendan bleiv kærd av íbúgvum í Æðuvík. IMR hevur hin 12. januar 2012 staðfest góðkenningina av umhvørvisárinsmetingina.

## 5. Málsviðgerð

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð send Elfelagnum SEV og Nes kommunu til viðmerkingar tann 7. desember 2011.

SEV hevði ongar viðmerkingar til uppskotið.

Viðmerkingar komu frá Nes kommunu. Nes kommuna metir ikki, at umhvørvisgóðkenningin tekur atlit til øll viðurskifti, sum koma at hava ampa fyri umhvørvið í Nes haga. Kommunan vísir á, at vegurin fer at hava økta ferðslu við sær, og kann tað órógva fuglalívið í økinum.

Umhvørvisgóðkenningar seta ikki treytir til vegir, men bert til sjálvt virksemið, sum her eru vindmyllurnar. Umhvørvisstovan fer tí ikki at seta treytir til vegin, sum gongur út til vindmyllurnar, í umhvørvisgóðkenningini. Ein umhvørvisárinsmeting fyri økið er gjørd, og hevur Umhvørvisstovan

góðkent hesa við ávísum treytum, m.a. til vegin. Sostatt eru viðmerkingarnar hjá Nes kommunu tiknir við í tí samanhanginum.

Harafturat hevur Umhvørvisstovan móttikið eitt mótmælisskriv frá 48 borgarum í Æðuvík. Skrivið er eitt generelt mótmælisskriv um ætlanina at seta fleiri vindmyllur upp omanfyri Æðuvík. Víst verður á, at órógv og misprýði av myllurnum, fer at elva til fráflyting og fall í húsaprísum í Æðuvík. Eisini verður víst á, at skuggakast frá vindmyllubløðunum frá verandi vindmyllum í Neshaga er til stóran ampa í summum húsum, at nógv óljóð er frá verandi myllum, og at borgararnir vænta, at hetta verður enn verri, um fleiri vindmyllur verða settar upp.

Umhvørvisstovan hevur tí hert treytirnar um skuggakast sum vóru í uppskotinum, við at áseta markvirði um, at tað í mesta lagi kann góðtakast 10 tímar við skuggakasti árliga í grannaøkjum, umframt treyt um, at um skuggakast verður meira enn ásetta markvirði, skal vindmyllan steðgast, til veðurlíkindini eru broytt, soleiðis at skuggakast ikki kemur fyri longur.

Sambært óljóðskanningum har bæði nýggju og verandi vindmyllurnar eru tiknar við, verða markvirði til óljóð hildin. Tí hevur Umhvørvisstovan ikki gjørt meira við treytirnar um óljóð.

**Undir málsviðgerðini er serligur dentur lagdur á:**

- At virksemið elvir til minst møguliga dálking av umhvørvinum og hevur minst møguligar ampar av óljóði og ljósi – herundir endurskini og skuggakasti - við sær

Tað móttikna tilfarið og annað samskifti, umframt vegleiðing hjá Umhvørvisstovuni nr. 2011-13 um óljóð og norðurlendskar reglur til líknandi virksemi, hevur verið grundarlag undir viðgerðini av umsóknini.

## 6. Almennar treytir

6.1.1. Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og verða kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á.

6.1.2. Allar sýnistøkur og kanningar v.m., sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini, skulu gerast av starvsstovu, sum kann góðkennast av Umhvørvisstovuni.

6.1.3. Allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum verða goldnar av felagnum.

6.1.4. Virksemið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti virkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting.

6.1.5. Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni. Um virksemið heldur uppat, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur.

6.1.6. Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkseminum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

6.1.7. Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin, kunnu ikki gevast onnur boð ella forboð, enn ásett í hesi góðkenning, uttan so at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin.
- dálkingin elvir til umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin.
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

6.1.8. Tá ið meira enn 5 ár eru gingin, eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í góðkenningini, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri reinsingarhættir ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

# 7. Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við niðanfyri nevndu treytum:

## 7.1. Innrætting og rakstur

7.1.1. Vindmyllurnar skulu staðsetast, rekast og viðlíkahaldast soleiðis, at treytirnar í hesi góðkenning altíð verða hildnar.

7.1.2. Best tøka tøknin (BAT[1]) skal í størst møguligan mun verða nýtt.

7.1.3. Boðast skal Umhvørvisstovuni frá, tá farið verður undir ætlanina. Ganga meiri enn tvey ár frá tí at umhvørvisgóðkenning er lýst, til farið er undir ætlanina, fellur umhvørvisgóðkenningin burtur.

## 7.2. Burturkast

7.2.1. Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[2] og skal latast til góðkendan móttakara.

7.2.2. Burturkast frá viðlíkahaldi o.ø. skal latast til góðkendan móttakara beinan vegin viðlíkahaldsarbeiði ella annað er liðugt, og má ikki goymast á staðnum, har vindmyllurnar standa.

## 7.3. Óljóð, ristingar og ljós – herundir endurskin og skuggakast

7.3.1. Alt virksemi skal fara fram soleiðis, at tað í minst møguligan mun hevur við sær ampar av óljóði, ristingum og ljósi - herundir endurskini og skuggakasti.

7.3.2. Raksturin av vindmyllunum má ikki hava við sær meira enn 10 tímar skuggakasti í grannaøkjum. Viðføra veðurlíkindini meira enn 10 tímar við skuggakasti árliga, má vindmyllan, sum elvir til skuggakastið, steðgast, til veðurlíkindini broytast, soleiðis at hon ikki longur elvir til skuggakast.

7.3.3. Raksturin av vindmyllunum má ikki hava við sær, at óljóðsstøðið, ásett sum ekvivalenta, korrigeraða óljóðsstøðið í dB(A), fer upp um niðanfyri nevndu mørk:

(1) Við bústaðir uttan fyri øki, sum sambært kommunalu byggisamtyktina er lagt út sum bústaðarøki, skal óljóð ikki fara upp um 44 dB(A) tá vindurin er 8 m/s og 42 dB(A) tá vindurin er 6 m/s.

---

[1] **Best Available Techniques**. Hugtakið *besta tøka tøknin* er at skilja sum mest framkomnu framleiðsluhættir, tilgongdir og rakstrarmannagongdir, sum til einhvørja tíð eru mest munadyggar fyri at fyribyrgja og avmarka dálking frá ávísari vinnugrein ella ávísum virksemi. Hugtakið fevnir ikki bert um tøkniligar loysnir, men eisini um t.d. nútímans framleiðsluhættir, nýtslu av minni dálkandi rávørum, avmarking av burturkasti, endurnýstlu og endurvinning, umframt nýtslu av rávørum og orku. Ein treyt fyri at koma undir hugtakið er eisini, at tøknin er roynd og tøk á marknaðinum fyri rímiligan kostnað.

[2] Kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast, broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

(2) Á økjum, ið sambært kommunalu byggisamtyktini eru løgd av til bústaðir, stovnar, summarhús ella onnur frítíðarendamál, skal óljóð frá myllunum ikki fara upp um 39 dB(A) tá vindurin er 8 m/s og 37 dB(A) tá vindurin er 6 m/s.

7.3.4. Í sambandi við eftirlit ella klagur um óljóð ella skuggakast, kann Umhvørvisstovan krevja mátingar og útgreiningar av óljóðinum ella skuggakastinum frá vindmylluni, tó í mesta lagi eina ferð um árið. Kanningarskrá skal tá frammanundan sendast Umhvørvisstovuni til góðkenningar.

## 7.4. Innaneftirlit og umhvørvisstýrisskipan

7.4.1. SEV skal hava eina skipan, sum skrásetir nær skuggakast kemur fyri í grannaøkjum, og sum harvið tryggjar, at skuggakast ikki kemur fyri í meira enn 10 tímar árliga. Hetta merkir, at SEV má hava eina skipan, sum steðgar vindmylluni, sum elvir til meira skuggakast enn markvirði loyvir.

7.4.2. Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið skjalprógvar, at treytirnar um óljóð, ristingar og ljós – herundir endurskin og skuggakast - verða hildnar.

7.4.3. Umhvørvisstovan kann krevja, at virkið ger serligar kanningar fyri at meta um møgulig dálkingarárin frá virkinum.

## 7.5. Rakstarskráseting/umhvørvisfrágreiðing

7.5.1. Virkið skal skráseta hesar upplýsingar:

- Orkuframleiðsla
- Tíðarskráseting av, nær skuggakast er
- Avhendaðar nøgdir av burturkasti, herundir eisini oljuburturkast og móttakari
- Rakstrartrupulleikar/óhapp
- Onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi, herundir um kærur hava verið um óljóð ella skuggakast, og hvat SEV hevur gjørt við tað

7.5.2. Rakstrarskrásetingarnar skulu til eina og hvørja tíð kunna síggjast av eftirlitsmyndugleikanum og skulu goymast í 5 ár.

7.5.3. Elfelagið SEV skal á hvørjum ári gera umhvørvisfrágreiðing við uppgerð av rakstrarskrásetingum, frágreiðing um umhvørvisviðurskifti, óhapp, gjørd og ætlað umhvørvistiltøk. Frágreiðingin skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. mars í avloysandi árinum.

## 7.6. Óhapp

7.6.1. Har vandi er fyri spilli av evnafrøðiligum evnum – herundir olju, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum. Virkið skal hava útgerð til uppruddingar eftir møgulig óhapp.

7.6.2. Henda óhapp, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til avmarking og upprudding. Størri útlát ella dálking, skal skjótast gjørligt fráboðast Umhvørvisstovuni. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk til upprudding v.m. sendast Umhvørvisstovuni[3].

---

[3] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).

## 8. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 128 frá 22. desember 2008, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Suni Petersen, deildarleiðari

/

Eyð Eidesgaard, umhvørvisviðgeri

**Avrit:** Nes Kommuna, Toftavegur 3, FO-650 Nes

Landslæknin, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn.